# Posta Stamps

Føroyar

No. 47

Februar 2021



- Sepac 2021: Føroyar á søguligum kortum II
- Europa 2021: Lundin
- Neytahald í Føroyum
- Kongavitjan í 1921
- Faroe Islands Study Circle 30 ár
- Endasøla

Posta
FAROE ISLANDS




Royndarprent




# Sepac 2021: Føroyar á søguligum kortum II

**Sebastian Münster: *Septentrionales regiones* 1678**

Hin lærdi týskarin Sebastian Münster (1488-1552) var kendur geografur úr 16. øld. Bókin hjá honum *Cosmographia* kom fyrstu ferð út í 1544. Verkið økti um vitanina um geografi. Hon kom út í 40 útgávum á seks ymiskum málum. Her gjørdi Münster serlig kort til allar heimspartarnar.

Á hesum frímerkinum síggja vit kortið *Gemeine beschreibung aller Mittnächtigen Länder / Schweden / Gothen / Nordwegien / Deñmarck / rc* útgivið í 1578. Tað varð prentað undir navninum *Septentrionales regiones*.

Seinni varð bókin *Cosmographia* endurnýggjað av stjúksoninum, Henri Petri. Tá Petri doyði in 1579, tók sonur Petri, eisini nevndur Sebastian, arbeiðið á seg at endurnýggja kortini. Uppafturprentað í 1588 sæst at fyrimyndin partvíst er hálenski teknarin Abraham Ortelius (1527-1598) og kortið hjá honum av Norðurlondum.

**Kort og vitanin um heimin**

Kendu ferðirnar hjá eitt nú Columbusi, da Gama, Vespucci og Magellan komu at broyta heimsmyndina í samtíðini, ikki minst kortini. Kortið hjá Münster var eisini hugbirt av Olaus Magnusa *Carta marina*.

Sjálvur fann Münster einamest vitan til kortini frá skrivaðum keldum.

Münster var eisini inspireraður av Jacob Ziegler (c. 1470/71-1549) og bók hansara um Norðurlond frá 1532.




*Partur av kortinum, sum vísir havdjór og ódjór. Sebastian Münster.*

Nógv kort frá Italia komu at minna um kortið hjá Giacomo Gastaldi Vincenzo Valgrisi.

**Havdjórini hjá Münster**

Norðurlond vóru sædd sum eitt myrkt økið í heiminum, har deyði og annað ónt búði, men hinvegin eisini sum eitt stað við gleði og góðum fólkum.

Sebastian Münster er kendur fyri kortini hann gjørdi av havódjórum í *Cosmographia* – hesi vóru bæði verulig og ímyndað. Upprunin til hesi havdjórini er kortið *Carta marina* frá 1539 hjá Olaus Magnus.

Tað kann í dag vera heldur ringt at skilja áhugan fyri havdjórum og ódjórum, kanska tók Münster, eins og Olaus Magnus tey við í kortini fyri at skapa spenning og mystik.

Eitt av hesum avmynda eina gallión, ið roynir at sleppa undan einum havódjóri við at kasta lastina fyri borð. Hetta kunnu vit lesa um hjá Olaus Magnusi, at slík vóru ikki óvanlig undir Føroyum.

Seinni finna vit fleiri av hesum havdjórunum og ódjórum á íslandskortinum hjá Ortelius frá 1587.

*Cosmographia* varð givin út fram til 1628, langt aftaná at Münster var deyður. Hon kom í 24 broyttum útgávum, og soleiðis gjørdist hon týdningarmikil fyri lærugreinir sum geografi, astronomi, søgu og náttúruvísindi.

Sebastian Münster doyði í Basel í Sveits í 1552 av svartadeyða.

*Kim Simonsen, Ph.D. og MA*







Royndarprent




# Europa 2021: Hótt fuglasløg

Postverkini, sum eru limir í evropiska postsamstarvinum "PostEurop", semjast á hvørjum ári um, at gera frímerki við ávísum evni. Evnið á europafrímerkjunum í ár er "Hótt djóra- og fuglasløg".

**Lundin – eitt hótt fuglaslag á reyðlista**

Lundin við stóra litfagra nevinum og brandgulu beinunum er ein ímynd av Føroyum og tey flestu, sum koma til Føroya um summarið, vænta at síggja nógvan lunda; men nógv verða vónbrotin, tí stovnurin er nógv minkaður seinastu áratíggjuni. Í 2017 setti IUCN (International Union for Conservation of Nature) lundan á reyðlistan yvir hótt fuglasløg.

Minkingin í føroyska lundastovninum byrjaði longu í 1768. Tá sigldi eitt skotskt skip úr Trondheimi til Írlands, men rendi á landi við skotsku oynna Lewis og vrakið rak til Hvalbiar. Við vrakinum var altoyðandi brúna rottan (*Rattus norvegicus*).

Longu í 1769 hevði eitt annað ókent skip rottu við til Havnar, sum skjótt spjaddi seg til Vágar og Eysturoynna. Um ár 1900 kom rottan til oyggjarnar Borðoy, Viðoy og Kunoy í samband við at ein norsk hvalstøð varð bygd. Í dag er rotta í sjey av teimum átjan oyggjunum í Føroyum.

Brúna rottan hevur fullkomiliga avoytt teir fuglar, ið reiðrast í mold, sum til dømis lunda (*Fratercula arctica grabae*), skráp (*Puffinus puffinus*) og drunnhvíta (*Hydrobates pelagicus*) á teim sjey størstu oyggjunum. Rottan er før fyri at eta sjálvt teir vaksnu fuglarnar, so egg og ungar er løtt atkomilig føði hjá teimum.

Lundin hevur sum matur havt stóran týdning fyri føroyingar. Umframt at lundin varð etin, so kundi man fyrr í tíðini selja fjaðrarnar til útflutnings, so fjaðrar vóru eitt av fáu tingum, sum góvu fólki reiðan pening í hondina. Flestu lundar vórðu fleygaðir við fleygingarstong. Ein fleygingarstong er ein uml. tríggjar metra long stong við einum trý-hyrntum neti í endanum. Men fram til 1942 vórðu nakrir búfuglar tiknir beinleiðis úr holunum og dripnir meðan aðrir vórðu skotnir.

Ongin veit í dag hvussu stórur føroyski lundastovunurin er, og hóast fleyging í


*Lundi og lundaholur. Mynd: Jens-Kjeld Jensen.*

lundalandi einamest fangar ungar lundar og ikki búfuglin, hevur tann nógva veiðan gjøgnum tíðirnar helst verið ov stór. Seinast í 1930'unum vórðu umleið 350.000 lundar fleygaðir árliga.

Lundin, sum einans verpir eitt egg, hevur seinastu 25 árini havt eina aðra stóra avbjóðing – nevniliga føðitrot til pisuna. Tann lítla feita nebbasildin (*Ammodytes dubius*) er høvuðsføðin hjá lundanum. Nebbasild verður ikki veitt við Føroyar, so tað er ikki orsøkin til at hon er horvin. Ongin veit reiðiliga hvussu hetta hongur saman, men hægri hiti í sjónum og trot á æti er helst mest eyðsýnda orsøkin.

Og fyri at gera tað enn verri: tá lundin ikki verpur ella pisan doyr, so fer búfuglurin at flúgva í ring og verður nú eisini fleygaður. Um ár 2000 vórðu umleið 100.000 lundar fleygaðir árliga og ein stórur partur av teimum var búfuglur, so tað hevur uttan iva verið viðvirkandi til at føroyski lundastovnurin er í so ringum standi.

Veiðan eftir lunda er ikki høvuðsorsøkin til, at tað nú einans eru nøkur fá prosent eftir av lundanum, samanborið við lundastovnin fyri 300 árum síðani; men tað er ófyrigeviligt at lundin í 2021, ikki er friðaður í Føroyum enn.

Tað sær út til, at veðurlagsbroytingarnar hava stóra ávirkan á nebbasildina, sum er høvuðsføðin hjá lundapisunum. Onnur føroysk fuglasløg, sum t.d. skrápur (*Puffinus puffinus*), ternan (*Sterna paradisaea*) og rita (*Rissa tridactyla*) eru eisini bundin at nebbasildini.

Í dag verður hildið, at tað eru umleið 100.000 lundapør eftir í Føroyum. Lundin verður gamal, og tí fer lundi esini at síggjast tey komandi mongu árini, sjálvt um stovnurin er í minking.

Elsti lundi, sum fólk vita um, gjørdist 41 ár.

*Jens-Kjeld Jensen*








Royndarprent




# Neytahald í Føroyum

**Føroyska kúgvin og støðufesti í føroyska bóndabúskapinum**

Eitt bóndasamfelag brúkar sera nógva orku upp á at tryggja, at samfelagið yvirlivir upp á stutt sikt. Svongdin skal haldast burtur. Í føroyska bóndahúsarhaldinum var siðurin tann, at har tað var møguligt, so var matur fyri eitt ár á goymslu, men hetta var ikki altíð gjørligt, orsakað av óstøðuga føroyska veðurlagnum. Í naturalbúskapinum í bóndasamfelagnum, áðrenn fiskiskapur á opnum havi og fíggjarbúskapur gjørdist grundarlagið undir føroyska samfelagnum, snúði alt seg um mongdina og álitið á, at nokk var til av mati. Ein kanning við tølum frá 1813 vísir at 45 prosent av dagligu orkunýtsluni kom frá mjólkini. Harafturat var mjólkin eisini tað mest álítandi føðievni. Tað setur mjólkina og harvið kúnna í miðdepilin í upprunaliga føroyska samfelagsbúskapinum.

**Kúgvin og bøurin**

Kúgvin ger gras til mjólk og harvið mjólkamat. Hetta gjørdi, at grasið var tann týdningarmiklasta grøðin í føroyska bóndasamfelagnum. Um várið, summarið og um heystið var kúgvin á beiti, men um veturin stóð hon í fjósinum. Tað var tí neyðugt, at hava nokk av hoyggi fyri at kunna halda kúnna á lívi til várið kom. Kúfóðurið, tann mongdin av hoyggi, sum ein kúgv etur um veturin, gjørdist sostatt lívsneyðugt. Hetta varð eisini ofta nýtt sum eitt mát fyri jarðarvídd.

Rundanum bygdina lá tann umgyrdi velti bøurin, sum gav so nógv gras, at tað kundi hoyggjast til eitt kúfóður, tað sum kúgvin skuldi eta um veturin. Men fyri at grasið skal vaksa væl, so krevst at bøurin verður veltur og enn týdningarmiklari er, at moldin fær nóg mikið av tøðum. Eisini her var kúgvin ómissandi. Tað, at kúgvin stóð í fjósinum um



*Neyt í haganum á Velbastað. Mynd: Jógvan Hansen.*

veturin, gørdi at tað bar til at savna saman neytamykju og goyma hana í køstinum til várs. Blandað saman við øðrum tøðum, til dømis tara, so slapst undan at útpína moldina.

Bøurin var eisini nýttur til at velta korn. Skift var ímillum, hvar korn varð velt og hvar hoyggjað varð. Men tað var bara, tá korn varð velt, at moldin eisini varð velt. Jørðin varð velt við handmegi og til tað varð hakin brúktur.  Fyrst vórðu tøðini borin í leypi út á akurin og stroydd omaná tær trappulíknandi grasfláirnar. Ein smøl ál av flagi varð skorin av niðasta trappukantinum og lagt oman á tøðini umleið ein tumma til tjúkdar, síðan koyrt sundir í minni pettir og kornfræini vórðu síðani stroydd javnt út yvir moldina. Síðani varð moldin klappað saman við einari pláti við skafti – einum sonevndum klara. Eftir kornveltingina var moldin so væl taðað, at nú kundi hoyggjast tey næstu fimm til seks árini. Bøurin varð sostatt veltur og taðaður í eini ringrás, har kúgvin, bæði var ein neyðugur partur, og var við til at tryggja og útvega mat í einum lutfalsliga tryggum búskapi.

Á frímerkinum sæst eitt kúgvahøvd randað við bø-ringrásini, framleiðslu av korni, hoyggi og mjólk.

**Kúgvin í fjósinum**

Tá kúgvin stóð á bási í fjósinum, skuldi ambætast, fóðrast, mjólkast og sópast. Kvinnurnar stóðu fyri øllum hesum arbeiðnum. Einans tá kúgvin skuldi til tarv, tóku menninir yvir. Kúgvin skuldi helst kálvað um várið, tá góður møguleiki var fyri at standa á beiti. Kálvarnir, sum ikki skuldu brúkast, vórðu skjótt slaktaðir. Fjórði magin á nýkálvaða kálvinum varð turkaður og goymdur, tí hann hevði ostarennu í sær. Ostarenna



*Neytakonur. Mynd: Tjóðsavnið. SNR:3350-2662.*

ger at mjólk kann gerast til ost. Heilt fram til 1970'ini høvdu nógvar føroyskar familjur eina kúgv í kjallaranum. Ofta sást tað á børnunum, tá kúgvin hevði kálvað og húsarhaldið aftur fekk mjólk.

Á frímerkinum sæst tað eyðkenda myndevnið; kvinna, ið mjólkar kúnni í fjósinum.

**Neytini í haganum**
Upprunaliga føroyska kúgvin var lítil og lágbeint, men er nú útdeyð. Hon var kná og von við at ganga har bratt var og kláraði seg væl í haganum í skiftandi veðri. Ofta var ikki so nógv til av fóðuri, so kýrnar kundu verða rak og avmaktaðar um várið. Men hetta slagið kom seg skjótt, tá tað kom út á beiti og var væl í holdum, tá heystið kom.

Um summarið, og so leingi, sum tað bar til fyri kulda, vindi og avfalli, gingu neytini í haganum. Hetta hevði við sær, at neytakonurnar summarhálvuna máttu fara út um bøgarðarnar tvær ferðir um dagin. Finna neytini, mjólka kúnum og bera mjólkina heim til húsa.

Á frímerkinum síggjast vanlig føroysk neyt, ein kúgv og ein tarvur í haganum, sum tey kundu havt sæð út í seinnu helvt av 19. øld, tá tey longu so smátt vóru vorðin blandað við útlendsk neytasløg.

*Ole Wich*







Royndarprent




# Kongavitjan í 1921

## Christian X kongur í Føroyum

**Christian IX kongur** var fyrsti sitandi danski kongur, sum vitjaði í Føroyum. Hendan einasta vitjanin var í 1874, tá timburfrigattin *Jylland* hjá danska flotanum eitt stutt tíðarskeið gjørdist kongaskip fyri at føra kong til Íslands, og ávegis legði at landi í Føroyum. Eins og faðirin vitjaði **Fríðrikur VIII kongur** bert einaferð oyggjarnar, tað var í 1907.

Mótsatt abba og pápa sínum vitjaði **Christian X Kongur** í Føroyum meira enn ta einu ferðina. Fyrsta vitjanin var í 1921, tá kongurin saman við Alexandrinu drotning og synunum Fríðriki krúnprinsi og Knúti prinsi tann 17. juni fór úr Keypmannahavn á veg til Føroya. Sjálvt um serbygda kongaskipið *Dannebrog* var tøkt, var hildið, at ein hjóldampari kanska ikki var besti flutningur til tær umstøður, ein sjálvt á sumri kundi koma út fyri í Norðuratlantshavi. So kongurin og drotningin vóru umborð á Valkyrien, sum var eitt danskt hernaðarskip, og krúnprinsurin var umborð á krússaranum *Heimdal*; Krússarin *Fylla* var eisini partur av tí kongaliga skipafylginum. Ringt veður gjørdi, at ein óætlaður steðgur var í Skagen, men tá tey komu til Vágs á morgni tann 21. juni, var tað undir betri og róligari umstøðum. Hetta var ikki bygdin, tey fyrst høvdu ætlað at vitja, og ongin almenn móttøka var at heilsa kongaliga fylginum.

Klokkan eitt seinnapartin var skipafylgið farið til Tvøroyrar, har mong folk vóru niðri á bakkanum og úti á fjørðinum í føroyskum bátum at taka ímóti. Eitt postkort, sum J. Chr. Olsen gav út, og sum vísir kongshjúnini, tá tey verða róð í land, er myndevni á fyrra frímerkinum í útgávuni. Á keiini tók vinnulívsmaðurin Peter Mortensen ímóti kongi og drotning. Síðani var farið í Tvøroyrar Klubba, har beiggi Petur, Niels Juel Mortensen, helt røðu og skálað varð í sjampanju. Á mynd 1 síggja vit eitt annað postkort í røðini J. Chr. Olsen gav út. Tað vísir kongaligu hjúnini koma oman Miðbrekku á Tvøroyri, helst eftir at hava vitjað í Klubbanum. (Tað hevur víst seg, at kortið er skeivt merkt, tí hóast forlagið sigur at myndin er tikin í Havn, so vísir ein gjøllari kanning av landslagnum aftanfyri, at tað er Ravnagjógv omanfyri Tvøroyri) Kongaliga fylgið vitjaði síðani kirkjuna (FO 504), sum var vígd árið eftir, at Fríðrikur VIII

kongur hevði vitjað. Hetta var myndevni á einum øðrum postkorti, sum Olsen gav út. Vitjað var eisini á skúlanum og á sjúkrahúsinum. Seinnapartin var kongur vertur við móttøku umborð á *Valkyrien*, og seinni um kvøldið vóru kongaligu gestirnir aftur í landi fyri at síggja føroyskan dans.

Morgunin eftir hildu kongaligu gestirnir leiðina fram til Havnar, har Elias Olrik, amtmaður tók ímóti, tá tey komu í land. Eitt annað postkort, sum Olsen eisini lat prenta, vísir hesa løtuna og er myndevni á seinna frímerkinum í útgávuni. Býráðsformaðurin í Havn, Anton Degn, helt vælkomstrøðuna á keiini. Vitjað var í Løgtingshúsinum, á Kongaminni, sum varð reist til minnis um vitjanina hjá Christiani IX kongi í 1874 og í Havnar kirkju. Um kvøldið var døgurði á Realskúlanum við røðum, tónleiki og sangum, sum Hans Andrias Djurhus hevði yrkt (FR 096), Seinni var dansað í Havnar Klubba.

Tíðliga morgunin eftir, tann 23., fóru kongur og skipafylgið norður til Klaksvíkar, har O. F. Joensen, bygdarráðsformaður, tók ímóti á keiini. Síðan var vitjað á skúlanum og í kirkjuni. Aftaná hugdi kongur at svimjikapping og kappróðri á Vágni og handaði heiðursmerki til vinnararnar og tey, sum vóru nummar tvey. Stutt eftir middag fór tað kongaliga fylgið aftur til Havnar, og eftir at hava etið hjá amtmanninum fóru tey til staðið, har nýggja sjúkrahúsið skuldi byggjast. Har legði kongur hornasteinin og Johan Hendrik Poulsen, løgtingslimur úr Sandoynni, helt røðu, har hann bað um loyvi at nevna nýggja sjúkrahúsið eftir drotninigini. Hetta ynski var gingið á møti, og tá sjúkrahúsið stóð liðugt í 1924 fekk tað navnið *Dronning Alexandrines Hospital*. (Bygningurin hýsir í dag føðideildini á LS) Seinni sama dag, tá kósin varð sett móti Íslandi, byrjaði kongaliga skipafylgið næstu vitjan sína í Norðuratlantshavi.

Kongur vitjaði aftur í 1926 og 1930 og var tað tá eitt annað herskip, Niels Juel, sum førdi kong til Føroya. Eitt nýtt kongaskip, *Dannebrog*, varð tikið í nýtslu í mai 1932, og tað var mett hóskandi at sigla í Norðuratlantshavi. Hetta skip førdi Christian Kong á hansara fjórðu og seinastu Føroyavitjan í 1936. Hesu ferð hevði kongur aftur drotningina við og somuleiðis Knút prins og konu hansara Carolinu-Matildu prinsessu. Fyrsta vitjanin var í Vági, leygardagin tann 13. juni, og seinni sama dag fóru tey til Tvøroyrar. Dagin eftir vóru tey í Havn, har kongur vitjaði á Sanatoriinum í Hoydølum (FO 624), meðan drotningin vitjaði á nýggja hvíldarheiminum fyri kvinnur, Naina. Seinni vitjaðu kongaligu hjúnini á sjúkrahúsinum, sum var uppkallað eftir drotningini. Um kvøldið vóru hjúnini í veitslu í Sjónleikarhúsinum, har hildið varð á til tann ljósa morgun.

Mánadagin eftir kl 14:00 fór *Dannebrog* av Havnini við kós móti Vestmanna, har akkerið fall kl 16:30. Til móttøkuna á kaiini vóru ikki bert politikarar og embætisfólk, sum hildu røðu, men eisini skúlabørn, sum sungu kongaliga danska tjóðsangin *"Kong Christian stod ved højen mast"* og føroyska tjóðsangin *"Tú alfagra land mítt"*. Kongur fór umborð aftur á Dannebrog kl 18:30, har hann seinni hevði móttøku fyri betra slagnum í Vestmanna. Kl 22:00 sama kvøld fór Dannebrog av Vestmanna við kós móti Islandi.




*Mynd. 1. Kongaligu hjúnini koma oman Miðbrekku á Tvøroyri. Eitt postkort í røðini, sum J. Chr. Olsen gav út í sambandi við kongavitjanina.*

Hóast hetta var einasta ferðin Christian X kongur vitjaði í Føroyum við kongaskipinum Dannebrog, so hevur skipið ofta verið at sæð í Føroyum síðani. **Fríðrikur Kongur IX** nýtti skipið á øllum sínum fimm vitjanum, og nógvar ferðir síðani hevur Hennara Hátign **Margreta drotning II** og onnur í kongaligu familjuni verið í Føroyum við kongaskipinum. Kongaskipið er partur av myndevninum á smáarki, sum varð givið út í samband við, at drotningin hevði sitið 25 ár á trónuni (FR 302).

*Álvur Danielsen & Brian Hague*



*Búmerkið hjá Faroe Islands Study Circle*

# Faroe Islands Study Circle 30 ár

Vit ynskja Faroe Islands Study Circle hjartaliga til lukku, nú tað í apríl 2021 eru liðin 30 ár síðani felagsskapurin varð stovnaður. Nógvir aðrir líknandi felagsskapir hava Føroyar við, men hildið verður, at hetta er tann einasti felagsskapurin, sum burturav granskar føroysk frímerki og føroyska postsøgu.

Faroe Islands Study Circle var stovnaður í Bretlandi í 1991. Endamálið var tá sum nú, at fáa í lag samband millum savnarar av føroyskum frímerkjum, stemplum, postsøgu og postkortum. Limirnir býta út vitan og kunna hvønn annan um hesi áhugamál. Teir flestu limirnir hava harafturat eisini ein meira almennan áhuga í Føroyum m.a. í føroyskari landalæru, søgu, mentan, flora og fauna – og roynir felagskapurin eisini at kunna um hesi evni.

Sjálvt um felagsskapurin framvegis hoyrir heima í Bretlandi, so kemur limaskarin úr mongum ymiskum londum. Í løtuni eru limir úr 16 londum - umframt Bretlandi - limir í felagsskapinum.

Faroe Islands Study Circle er ein enskttalandi felagsskapur. Hann gevur út eitt virðislønt blað, nevnt "238" navngivið eftir nummarinum, sum stóð á tí fyrsta Tórshavn stemplinum, eftir at fyrsta posthúsið lat upp í Føroyum 1. mars 1870. Blaðið verður sent til limirnar tvær ferðir um árið. Harafturat fáa limirnir eitt meira formelt tíðindabræv, eisini tvær ferðir um árið. Limirnir kunnu velja, um tey vilja hava blaðið og tíðindabrævið prentað og sent við postinum ella einans elektroniskt umvegis teldupost.

Í løtuni hevur Faroe Islands Study Circle tvær væleydnaðar uppboðssølur um árið, har



*Limir úr Faroe Islands Study Circle vitjaðu á Posta í juli 2018. Frá vinstru: Roger Tozer (formaður 2016-2020), John Smith (kassameistari síðan 1998), Marianna Nattestad (Posta), Sheila Denholm (nevndarlimur), Ingun Olsen (Posta), Norman Hudson (blaðstjóri síðan 1995 og skrivari síðan 1998).*

limirnir hava høvi til at keypa og selja filatelistiskar lutir, sum hava tilknýti til Føroya. Tey hava eisini gvið út eina røð av vælumtóktum postkortum, sum øll hava samband við ymisk postal evni. Fyrsta fyriskipaða ferðin til Føroya var í 1993, og tá vórðu nógv vinabond knýtt.

Øll hesi tredivu árini hevur Faroe Islands Study Circle verið ein óformellur og vinaligur felagsskapur. Hann hevur eina starvsnevnd, sum er vald av limunum og sum situr í tvey ár í senn, men tað sum drívur felagsskapin, hevur altíð verið vinalagið limanna millum.

Limaskapurin kostar 12 GBP (uml. 100 kr) um árið. Tá fært tú blaðið og tíðindabrævið umvegis teldupost. Um tú ynskir at fáa prentað bløð og prentað tíðindabrøv, so liggur prísurin onkustaðni ímillum 18 og 30 GBP (150 – 250 kr) alt eftir í hvørjum landi tú býrt.

Fyri nærri kunning, vinaliga setið tykkum í samband við skrivaran Norman Hudson, Faroe Islands Study Circle, 40 Queens Road, Vicar's Cross. Chester, CH3 5HB, GB. T-postur: jntropicsotmail.com. Heimasíða: www.faroeisslandssc.org.

*Norman Hudson*
*Blaðstjóri og skrivari*

Hesi frímerki ganga út

# Endasøla

Tann 7. juli 2021 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum. Hetta er tískil seinasti møguleiki at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði. Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella á www.stamps.fo.



PPS000517



PPS000217




PPA010217




PPA020415




PPA020217

*Sørvágsvatn/Leitisvatn: 17 og 19 kr hefti við 6 sjálvklistrandi frímerkjum. PPN00217.




PPA010517

*Europa 2017: 9,50 og 17,00 kr, hefti við 6 sjálvklistrandi frímerkjum. PPN00517.




PPA001017

*Føroysk klæðir II: 9,50 og 17,00 kr, hefti við 6 sjálvklistrandi frímerkjum. PPN00917.




PPA000857




PPA020517




PPS021017




PPA000869







* Vitar: 14,50, 15,50 og 17,00 kr, hefti við 6 sjálv-klistrandi frímerkjum. PPN00414.




PPA020414




PPS000917




PPA010917

Árbók 2016




FDC-mappa 2016



Ársmappa 2016




Heftimappa 2016



**Bílegg nú á stamps.fo**

# Nýggjar útgávur tann 26. apríl 2021




Royndarprent

Nýggj útgáva: **Sepac 2021: Føroyar á søguligum kortum II**
Útgávudagur: 26.04.2021
Virði: 27,00 kr
Nummar: FO 956
Stødd, frímerki: 35 x 36 mm
Stødd, smáark: 72 x 50 mm
Lagt til rættis: Kim Simonsen
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland
Postgjaldsbólkur: Brøv til útheimin, 0-100 g




Royndarprent



Nýggj útgáva: **Europa 2021: Lundi**
Útgávudagur: 26.04.2021
Virði: 17,00 og 27,00 kr.
Nummar: FO 957-958
Stødd, frímerki: 30 x 40 mm
Myndir: Thomas Vikre og Jógvan Hansen
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: Cartor Security Printing
Postgjaldsbólkur: Brøv innanoyggja og til útheimin, 0-100 gr.
+ sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum




Royndarprent

Nýggj útgáva: **Neytahald í Føroyum**
Útgávudagur: 26.04.2021
Virði: 7,00, 10,00 og 17,00 kr.
Nummar: FO 959-961
Stødd, frímerki: 40 x 30 mm
Listafólk: Ole Wich
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland
Postgjaldsbólkur: Ískoytisvirði og innanoyggja brøv, 0-100 gr.




Royndarprent

Nýggj útgáva: **Kongavitjan 1921**
Útgávudagur: 26.04.2021
Virði: 17,00 og 27,00 kr
Nummar: FO 962-963
Stødd, frímerki: 40 x 26 mm
Myndir: Gomul postkort
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland
Postgjaldsbólkur: Brøv innanoyggja og til útheimin, 0-100 gr.

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Kúgv í Kirkjubøhaga við Argir. Myndatøka: Jógvan Hansen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps